RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2016

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ........ 3

2. Árið ........ 4

2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ........ 4

2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt ........ 4

2.3 Vaksandi tollfrí søla ........ 4

2.4 Minkandi styrki í miðal ........ 5

2.5 Avlopskrav til avgjald ........ 5

2.6 Sølubúðir og tænasta ........ 6

2.7 Uppskot um pantskipan ........ 6

2.8 Starvsfólkakostnaður ........ 6

2.9 Árið samanumtikið ........ 7

3. Búskapur ........ 7

3.1 Umsetningur ........ 7

3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ........ 7

3.3 Rakstraravlopskravið ........ 7

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ........ 8

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ........ 8

4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ........ 9

4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar ........ 10

4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar ........ 11

4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva ........ 12

5. Ársroknskapur fyri 2016 ........ 13

5.1 Rakstrarroknskapur ........ 13

5.2 Fíggjarstøða ........ 14

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur sjey handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Drelnesi og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 30 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til umleið 30 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2016. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2016.

Tórshavn, tann 16. marts 2016

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkohol styrki. Hetta kunnu vit bert fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni.

Staðfestast kann, at einkarsølan virkar væl sum alkohol politiskt stýringsamboð.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur við sær minni inntøku hjá RSL - Hetta skyldast avgjalds og príspolitikkin.

RSL hevur undanfarnu árini arbeitt miðvíst við at tillaga raksturin til broytingarnar í alkoholnýtsluni. Samstundis er rakstrarkostnaðurin hjá RSL ikki øktur, hóast lønarhækkingar og aðrar príshækkingar hava verið.

## 2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt

Handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja alsamt meira veikan løg, tí serliga sølan av spiritusi minkar. Hetta vísir seinasta uppgerðin hjá Rúsdrekkasøluni.

Av øllum vørusløgum vórðu seldir 181.296 litrar innanlands av reinum alkoholi í 2016. Í 2008 vórðu seldir tilsamans 192.802 litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2008 vórðu seldir 46.899 litrar innanlands av reinum alkoholi í víni. Í 2016 var talið 53.975 litrar av reinum alkoholi.

Í 2008 vórðu seldir 87.304 litrar innanlands av reinum alkoholi í spiritusi, men í 2016 var talið minkað heilt niður í 67.449 litrar.

Sølan av øli hevur at kalla óbroytt í mong ár, men hetta er broytt í 2016. Í 2008 vórðu seldir 56.861 litrar innanlands av reinum alkoholi í øli. Í 2016 var 58.538 litrar av reinum alkoholi.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í 1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2016 var hon 6,3 litrar.

Í hesum tølum sæst tann veruleiki, at rúsdrekkavanarnir eru nógv broyttir. Nógv meira veikt verður keypt enn sterkt, og fleiri njóta heldur enn bara at rúsa seg.

## 2.3 Vaksandi tollfrí søla

Minkar sølan av reinum alkoholi í Rúsdrekkasøluni, er øðrvísi við tollfríu søluni, sum hevur verið nógv vaksandi, serliga seinastu árini.

Sølan av tollfríum rúsdrekka í 2008 var 22.641 litrar av reinum alkoholi. Í 2010 var talið 21.510 litrar, og í 2016 vórðu seldir 35.936 litrar av reinum alkoholi tollfrítt.

Tollfría sølan av reinum alkoholi í spiritusi vaks úr 19.296 litrum í 2008 upp í 25.382 litrar í 2016. Sølan av reinum alkoholi í víni vaks úr 1.435 litrar av reinum alkoholi í 2008 upp í 9.371 litrar av reinum alkoholi í 2016.

Samlaða tollfría sølan er nú 1,3 litrar í miðal fyri hvønn føroying árliga. Hetta talið skal leggjast aftrat teimum 6,3 litrunum, sum hvør føroyingur drekkur í miðal árliga.

Talið á 1,3 litrar av reinum alkoholi í miðal fyri hvønn føroying 15 ár og eldri árliga umfata tollfría sølu, sum Rúsdrekkasølan og bryggjaríini selja til flogvøllin og skip til proviantering. Ongi tøl eru tøk yvir søluna sjóvegis annars.

At munandi vøkstur er í tollfríari sølu, nýtist ikki at merkja, at nýtslan er vaksandi. Talan kann vera um, at nógv tollfrí søla, sum fyrr var í Kastrup, nú verður avgreidd í Vágum.

## 2.4 Minkandi styrki í miðal

Hagtøl vísa annars, at alkoholstyrkin í meðal av spiritusi, sum varð selt í Rúsdrekkasøluni í 1992, var 42,5 prosent. Í dag er meðalstyrkin av spiritusi, sum selt verður, 32,8 prosent.

Miðal alkoholstyrkin av øllum seldum vørum í Rúsdrekkasøluni minkaði úr 20,6 prosentum í 1992 heilt niður í 10,4 prosent í 2016.

Hesi yvirskipaðu tøl bera boð um broyttar vanar, og at sjálv alkoholstyrkin ikki longur hevur største týdningin fyri mong. – Dygd verður ráðfest heldur enn nøgd.

## 2.5 Avlopskrav til avgjald

Stovninum er álagt at veita landinum 16,8 mió. kr.í avlopi hvørt ár, sama um nýtslan veksur ella minkar. Eitt avlopskrav hevur verið álagt stovninum, síðan hann kom. Málið var, at avlopið lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtslu.

Rúsdrekkasølan hevur mælt politisku skipanini til at avtaka fasta avlopskravið og heldur leggja avgjøld á vørurnar, so avlopið fylgir nýtsluni.

Gongdin hevur verið, at færri litrar av reinum alkoholi verða seldir, og tí er vorðið alsamt truplari hjá Rúsdrekkasøluni at halda avlopskravið. Ein greið andsøgn er í, at stovnurin skal virka fyri at tálma nýtsluni, men noyðist at selja meira fyri at halda kravið. Eisini kann tann margháttliga støða íkoma, at neyðugt er at biðja um eykajáttan frá sama myndugleika, sum skal hava avlopið, fyri at halda kravið á 16,8 mió. kr.

Avlopskravið á fíggjarlógini á 16,848 mió., bleiv næstan rokkið í 2016. Tað bleiv selt nakað meira av spiritusi, víni og øli, meðan tað bleiv selt minni av heitvíni og áleið tað sama av alkoholfríum vørum. Søluvøksturin í litrum stavar í bæði frá øktari tollfríari og innanlands sølu.

Leiðslan í RSL hevur í tíðarskeiðnum millum 2010 og 2016 gjørt stórar tillagingar fyri at røkka økta avlopskravinum, sum í 2009 fór úr 11,848 mió. til 16,848 mió. í 2010 og frameftir.

Arbeitt verður áhaldandi ímóti einum skynsamari rakstri og bygnaði fyri at minka um útreiðslurnar uttan at niðurlaga tænastustøði.

Nýtslan í 2016 er enn á lægsta støði síðan RSL varð stovnað í 1992. Og er tað í trá við endamálið hjá RSL, ið m.a. sigur, at "Stovnurin skal, í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið."

Avtalan sum í 2015 varð gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Vinnumálaráðið um, at fara í eina tilgongd til at fáa avlopskravið flutt yvir á avgjøld er enn ikki rokkin. Arbeiðið steðgaði eftir at Løgtingsvalið varð skrivað út og hildið í september 2015 og er ikki tikið upp aftur eftir valið og óvist er nær hetta

verður gjørt. Rúsdrekkasøla Landsins vónar tó, at hetta arbeiðið verður raðfest soleiðis at framhaldandi rakstur verður smidligari í framtíðini.

## 2.6 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at uppfylla tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja. Arbeitt verður miðvíst við at laga seg til tær broytingar, ið eftirspurningur og viðskiftafólk ynskja.

Í fleiri ár hevur leiðslan eftir fíggjarligum førimuni havt fokus á at dagføra og uppstiga handlarnar kring landið.

Nýggj søludeild bleiv 10. mai 2015 latin upp við Norðskála. Hetta er sjeynda sølubúðin og hin fyrsta, síðan hinar seks lótu upp í 1992 og 1993.

Talan er um eina minni sølubúð, ið liggur við Norðskála, beint við brúnna um Streymin. Hon liggur í einum umhvørvi við góðum atkomumøguleikum har fleiri aðrir handlar eisini liggja.

Ynski hevði leingi verið at uppstiga tænastu okkara í Sundalagnum. Og við hesi sølubúðini hevur borið til at veita eina nógv betur tænastu til fólk í nærumhvørvinum og fólk sum ferðast regluliga um Streymin, enn áður.

Leiðslan á Rúsdrekkasølu Landsins er sera væl nøgd við at tænastustøði umframt rakstur og úrslit frá hesi sølubúð við Norðskála.

Nýggj deild bleiv tikin í nýtslu í Klaksvík 13. mars 2016. Talan er um eina væl størri sølubúð enn undanfarna, har møguligt er at hava størri vøruúrvæl og harvið tænastustøði. Eisini eru arbeiðsumstøðurnar nógv betur í nýggju sølubúðini. Ynski hevur leingi verið at uppstiga deildina, so vit kunnu veita eina betur tænastu í Klaksvík og Norðoyggjum. Leiðslan fegnast um at hetta nú gjørdist veruleiki.

Deildin á Drelnesi í Suðuroy er eisini dagførd við nútimans ljósum inventari. Ljós er í nýggju hillunum so tað gerst lættari at síggja vørurnar umframt at lesa hvat stendur á vørunum. Eisini er gjørt eitt serrúm til øli soleiðis at hetta stendur kaldari enn onnur vøra.

## 2.7 Uppskot um pantskipan

Rúsdrekkasøla Landsins hevur í 2016 mælt til, at sett verður á stovn ein nýggj pantskipan, sum skal taka sær av at savna inn allar fløskur og íløt, krevja inn og gjalda út pantið og standa fyri at skilja og beina tilfar til endurvinningar. Innflytarar, framleiðarar og IRF og Kommunala Brennistøðin á Hjalla kundu staðið fyri skipanini.

Enn er tó ikki nakað ítøkiligt hent í hesum málið.

## 2.8 Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaðurin fall í tíðarskeiðnum 2008-2013 til index 97, meðan hann í tíðarskeiðnum 2008-2016 vaks til index 111. Starvsfólkakostnaðurin svaraði í 2016 til 11% av umsetninginum.

Samanlagda fíggjarliga avleiðingin, av at tímalønt starvsfólk hava fingið 15% í eftirløn umframt at allir leiðara vegna avtalu millum Starvsmannafelagið og FMR eru umflokkaðir, er ein økt lønarútreiðsla á uml. 900 tkr. í 2016 og frameftir.

## 2.9 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið eydnaðist væl, men neyðugt er áhaldandi at tillaga raksturin fyri at ganga øktu lønarútreiðslunum á møti. Eisini er broytta keypsmynstri við lægri inntøku sum fylgju ein avbjóðing, tá avlopskravið er óbroytt.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu níggju árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 117 og 127 mió. kr.

Umsetningurin í 2016 er hin størsti, síðan RSL varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst, at umsetningurin er væl hægri enn hini árini. Sølan í 2016 var góðar 1,7 mió hægri enn í 2015 og 8,2 mió hægri enn í 2014.

Orsøkin til hesa hækking stavar í stóran mun frá, at samfelagsbúskapurin er sera góður, umframt at tollfría sølan eisini er økt munandi.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 127.438 | 125.766 | 119.286 | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2008-2016*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2016 býtir seg eins og árið fyri. Allir mánaðir uttan marts og oktober vóru betri enn væntað. Minst søla er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.

| (1.000 kr.) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 6.984 | 6.675 | 6.903 | 6.719 | 6.576 | 6.086 | 6.290 | 6.577 | 6.951 |
| Februar | 8.364 | 7.824 | 7.527 | 7.473 | 7.822 | 7.405 | 7.777 | 8.181 | 8.306 |
| Mars | 9.275 | 9.788 | 8.016 | 10.235 | 9.068 | 8.954 | 10.435 | 8.061 | 8.667 |
| Apríl | 10.025 | 9.220 | 8.883 | 7.859 | 9.301 | 9.436 | 7.560 | 9.397 | 8.484 |
| Mai | 10.763 | 10.433 | 10.295 | 10.887 | 10.814 | 9.823 | 9.958 | 10.054 | 10.131 |
| Juni | 11.557 | 11.299 | 10.477 | 11.210 | 10.949 | 10.400 | 10.536 | 9.942 | 9.599 |
| Juli | 14.775 | 14.558 | 14.332 | 13.054 | 13.844 | 14.402 | 15.957 | 15.243 | 13.360 |
| August | 9.830 | 9.709 | 9.406 | 9.499 | 9.025 | 8.543 | 8.541 | 8.173 | 8.485 |
| September | 9.432 | 8.901 | 8.298 | 8.006 | 7.955 | 9.010 | 8.480 | 7.625 | 8.065 |
| Oktober | 9.506 | 10.555 | 9.667 | 8.445 | 8.811 | 8.842 | 9.460 | 8.995 | 9.510 |
| November | 9.756 | 9.485 | 9.362 | 9.926 | 10.490 | 8.623 | 10.681 | 8.713 | 8.766 |
| Desember | 17.171 | 17.319 | 16.120 | 15.487 | 15.483 | 16.134 | 15.068 | 16.839 | 16.522 |
| **Íalt** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** | **116.844** |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2008-2016*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við útvið 50%, úr 11,848 mió. til 16,848 mió. Hetta hevur havt munandi príshækkingar á vørunum við sær, umframt umfatandi rationaliseringar, til tess at minka um útreiðslurnar. Hetta ber við sær at viðlíkahald og útskifting av útbúnaði hevur verið tálmað. Neyðugt hevur eisini verið, at havt eyka neyvt eftirlit er við øllum kostnaði.

Ein framgongd í umsetninginum frá 2015 til 2016, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er voksin . Tó stavar hesin vøkstur nærum einans frá framgongd í tollfríari sølu. Vinningurin á tollfríari vøru er munandi minni enn vinningurin av vøru seld í egnum sølubúðum.

Í 2016 vaks umsetningurin við 1,7 mió. í mun til undanfarna árið og eydnaðist tað næstan at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2016.

Kravið var kr. 16.848.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið bert kr. 16.732.384,00, tvs. ein munur uppá 115.616 kr.

Talvan 3.3 niðanfyri vísir gongdina í avlopi og játtan hjá RSL í tíðarskeiðnum 2008-2016.

| (1.000 kr.) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16848 | 16848 | 16848 | 16848 | 16848 | 16848 | 16848 | 11848 | 11848 |
| Avlop | 16745 | 16856 | 16650 | 16856 | 16849 | 16308 | 16505 | 11731 | 11733 |
| **Munir** | **-103** | **8** | **-198** | **8** | **1** | **-540** | **-343** | **-117** | **-115** |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2008-2016*

At avlopskravið hækkaði so nógv í 2010, hevði við sær, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað, og væl minni varð brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum.

Við óbroyttum inntøkum er vandi fyri, at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið, menningina og trivnaðin. Neyðugar íløgur í fløskumóttøkur, handlar, tólbúnað, førleikamenning o.l., ið skulu gerast, viðvirka til, at tað frameftir gerst alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2016 samanborðin við sjey undanfarin ár. Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavn** | 52.665 | 53.980 | 54.200 | 53.925 | 54.841 | 55.117 | 56.276 | 53.814 | 53.881 |
| **Klaksvík** | 12.243 | 12.065 | 11.745 | 11.668 | 11.743 | 10.969 | 10.918 | 9.753 | 9.827 |
| **Drelnes** | 9.173 | 9.336 | 9.205 | 9.481 | 9.124 | 9.091 | 9.474 | 9.298 | 9.748 |
| **Miðvágur** | 6.517 | 6.740 | 6.960 | 6.874 | 6.961 | 6.693 | 6.867 | 6.069 | 6.145 |
| **Skálavík** | 2.882 | 2.726 | 2.449 | 2.149 | 2.367 | 2.292 | 2.333 | 2.298 | 2.206 |
| **Saltangará** | 13.284 | 13.465 | 14.400 | 14.284 | 14.570 | 14.390 | 14.595 | 14.449 | 14.288 |
| **Norðskáli** | 6.136 | 3.848 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Ordrar o.a.** | 24.538 | 23.606 | 20.327 | 20.419 | 20.534 | 19.106 | 20.282 | 22.117 | 20.748 |
| **Íalt** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** | **116.844** |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2008-2016*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið relativt stabilur í árunum undan 2016. Umleið helvtin av umsetninginum stavar frá deildini í Tórshavn.

Deildirnar í Klaksvík, á Sandi og við Norðskála hava selt meira enn undanfarna ár, meðan deildirnar í Tórshavn, á Drelnesi, í Miðvági og í Saltangará hava selt minni. Meira er eisini selt av bíleggingum (ordrum o.l.) á høðusgoymsluni á Hjalla. Sølan í nýggju deildini við Norðskála stavar óiva m.a. frá deildini í Tórshavn og Saltangará. Tað er tó torført at gera eina endaliga niðurstøðu, tá so lítið er fráligið síðani deildin við Norðskála lat upp.

| (Vísutal) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 98 | 100 | 101 | 100 | 102 | 102 | 104 | 100 | 100 |
| Klaksvík | 123 | 123 | 120 | 119 | 119 | 112 | 111 | 99 | 100 |
| Drelnes | 96 | 96 | 94 | 97 | 94 | 93 | 97 | 95 | 100 |
| Miðvágur | 110 | 110 | 113 | 112 | 113 | 109 | 112 | 99 | 100 |
| Skálavík | 124 | 124 | 111 | 97 | 107 | 104 | 106 | 104 | 100 |
| Saltangará | 94 | 94 | 101 | 100 | 102 | 101 | 102 | 101 | 100 |
| Norðskáli | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Ordrar o.a. | 114 | 114 | 98 | 98 | 99 | 92 | 98 | 107 | 100 |
| **Íalt** | **109** | **108** | **102** | **102** | **103** | **101** | **103** | **101** | **100** |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2008-2016*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2008 og í 2016 eru samlaða vísutalið 109 í mun til í 2008.

Tað er stórur vøkstur í deildunum í Klaksvík, Sandi og Miðvági í tíðarskeiðnum 2008-2016. Eisini er vøkstur í bíleggingum (ordrum o.l.) og er hetta orsakað av øktari tollfríari sølu. Bíleggingar verða vanliga avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna á Hjalla.

Afturgongd er í umsetninginum í Tórshavn, á Drelnesi og í Saltangará, meðan bíleggingar (Ordrar o.a.) so at siga standa í stað.

Samanumtikið er sølan í kr. vaksin og liggur relativt stabil kring landið.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfríari sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| (Litrar) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **273.873** | **271.001** | **246.863** | **242.219** | **246.833** | **253.595** | **267.187** | **283.983** | **293.283** |
| *- Spiritus innanlands* | 205.159 | 201.846 | 191.510 | 192.252 | 200.028 | 207.354 | 225.030 | 230.179 | 242.342 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 68.714 | 69.155 | 55.353 | 49.967 | 46.805 | 46.241 | 42.157 | 53.804 | 50.941 |
| **Vín/cider** | **541.097** | **529.221** | **508.121** | **490.093** | **476.567** | **463.205** | **471.745** | **459.605** | **385.350** |
| *- Vín/cider innanlands* | 463.801 | 461.460 | 456.776 | 447.109 | 440.193 | 427.156 | 435.024 | 424.792 | 373.293 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 77.295 | 67.761 | 51.345 | 42.984 | 36.374 | 36.049 | 36.721 | 34.813 | 12.057 |
| **Heitvín** | **9.555** | **10.041** | **9.741** | **9.741** | **9.236** | **10.067** | **10.688** | **11.129** | **11.424** |
| *- Heitvín innanlands* | 7.648 | 8.323 | 8.079 | 8.699 | 8.232 | 9.051 | 10.026 | 9.803 | 10.220 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 1.907 | 1.718 | 1.662 | 1.042 | 1.004 | 1.016 | 662 | 1.326 | 1.204 |
| **Øl** | **1.086.767** | **1.060.514** | **1.025.672** | **980.493** | **1.036.304** | **1.032.874** | **1.100.784** | **1.102.801** | **1.155.632** |
| *- Øl innanlands* | 1.070.937 | 1.042.053 | 1.010.899 | 972.246 | 1.023.896 | 1.020.934 | 1.067.334 | 1.051.416 | 1.120.692 |
| *- Øl tollfrítt* | 15.830 | 18.461 | 14.773 | 8.247 | 12.408 | 11.940 | 33.450 | 51.385 | 34.940 |
| **Alkoholfrítt** | **2.268** | **1.200** | **776** | **928** | **1.401** | **935** | **831** | **579** | **670** |
| *- Alkoholfrítt innanlanc* | 2.268 | 1.200 | 693 | 916 | 891 | 935 | 782 | 577 | 670 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | 0 | 0 | 83 | 12 | 510 | 0 | 49 | 2 | 0 |
| **Í alt** | **1.913.560** | **1.871.977** | **1.791.173** | **1.723.474** | **1.770.341** | **1.760.676** | **1.851.235** | **1.858.097** | **1.846.359** |
| *- Í alt innanlands* | 1.749.813 | 1.714.882 | 1.667.957 | 1.621.222 | 1.673.240 | 1.665.430 | 1.738.196 | 1.716.767 | 1.747.217 |
| *- Í alt tollfrítt* | 163.747 | 157.095 | 123.216 | 102.252 | 97.101 | 95.246 | 113.039 | 141.330 | 99.142 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2008-2016*

| (Vísutal, litrar) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **93** | **92** | **84** | **83** | **84** | **86** | **91** | **97** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 85 | 83 | 79 | 79 | 83 | 86 | 93 | 95 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 135 | 136 | 109 | 98 | 92 | 91 | 83 | 106 | 100 |
| **Vín/cider** | **140** | **137** | **132** | **127** | **124** | **120** | **122** | **119** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 124 | 124 | 122 | 120 | 118 | 114 | 117 | 114 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 641 | 562 | 426 | 357 | 302 | 299 | 305 | 289 | 100 |
| **Heitvín** | **84** | **88** | **85** | **85** | **81** | **88** | **94** | **97** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 75 | 81 | 79 | 85 | 81 | 89 | 98 | 96 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 158 | 143 | 138 | 87 | 83 | 84 | 55 | 110 | 100 |
| **Øl** | **94** | **92** | **89** | **85** | **90** | **89** | **95** | **95** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 96 | 93 | 90 | 87 | 91 | 91 | 95 | 94 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 45 | 53 | 42 | 24 | 36 | 34 | 96 | 147 | 100 |
| **Alkoholfrítt** | **339** | **179** | **116** | **139** | **209** | **140** | **124** | **86** | **100** |
| *- Alkoholfrítt innanlanc* | 339 | 179 | 103 | 137 | 133 | 140 | 117 | 86 | 100 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | - | - | - | - | - | - | - | - | 100 |
| **Í alt** | **104** | **101** | **97** | **93** | **96** | **95** | **100** | **101** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 100 | 98 | 95 | 93 | 96 | 95 | 99 | 98 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 165 | 158 | 124 | 103 | 98 | 96 | 114 | 143 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2008-2016*

Talva 4.4 vísur gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekseraði tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2008-2016 í vørubólkunum spiritus og øl, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum vín/cider. Hetta vísir, at drekkimynstrið broytist soleiðis, at føroyingar nú keypa veikari sløg av rúsdrekka enn fyrr. Generelli mynstrið er tó at innanlands søla minkar, meðan tollfría sølan veksur.

## 4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar).

| (Alk. litrar) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **92.721** | **93.925** | **88.079** | **88.849** | **91.331** | **94.179** | **97.982** | **104.065** | **106.600** |
| *- Spiritus innanlands* | 67.449 | 68.563 | 67.688 | 70.140 | 73.527 | 76.516 | 82.375 | 84.079 | 87.304 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 25.382 | 25.362 | 20.391 | 18.709 | 17.804 | 17.663 | 15.607 | 19.986 | 19.296 |
| **Vín/cider** | **63.346** | **62.187** | **60.057** | **58.138** | **56.219** | **54.718** | **55.038** | **54.016** | **48.334** |
| *- Vín/cider innanlands* | 53.975 | 53.770 | 53.654 | 52.637 | 51.675 | 50.544 | 50.848 | 49.886 | 46.899 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 9.371 | 8.417 | 6.403 | 5.501 | 4.544 | 4.174 | 4.190 | 4.130 | 1.435 |
| **Heitvín** | **1.658** | **1.742** | **1.679** | **1.682** | **1.588** | **1.713** | **1.817** | **1.889** | **1.955** |
| *- Heitvín innanlands* | 1.334 | 1.452 | 1.408 | 1.516 | 1.424 | 1.554 | 1.707 | 1.664 | 1.738 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 324 | 290 | 271 | 166 | 164 | 159 | 110 | 225 | 217 |
| **Øl** | **59.397** | **57.547** | **55.142** | **52.435** | **54.923** | **52.774** | **56.056** | **55.918** | **58.554** |
| *- Øl innanlands* | 58.538 | 56.548 | 54.364 | 52.008 | 54.300 | 52.202 | 54.453 | 53.453 | 56.861 |
| *- Øl tollfrítt* | 859 | 999 | 778 | 427 | 623 | 572 | 1.603 | 2.465 | 1.693 |
| **Í alt** | **217.233** | **215.401** | **204.957** | **201.104** | **204.061** | **203.384** | **210.893** | **215.888** | **215.443** |
| *- Í alt innanlands* | 181.296 | 180.333 | 177.114 | 176.301 | 180.926 | 180.816 | 189.383 | 189.082 | 192.802 |
| *- Í alt tollfrítt* | 35.936 | 35.068 | 27.843 | 24.803 | 23.135 | 22.568 | 21.510 | 26.806 | 22.641 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2008-2016*

Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir innanlands minka javnt, meðan tollfría sølan veksur. Hetta er í tráð við tálmandi politikkin, sum RSL arbeiðir eftir. Útvið helmingurin, tvs. uml. 43% av alkohol litrunum, stava frá sølu av spiritusi, meðan uml. 29% stava frá vín og cider. Øl er 27% av samlaðu nøgdini av seldum alkohol litrum.

Samlað sæst, at sølan í alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2008-2016 so at siga er óbroytt. Ein stór afturgongd hevur tó verið í alkohol litrum seldir í sølubúðunum hjá RSL, meðan ein framgongd hevur verið í tollfríari sølu.

| (Vísutal, alk.l.) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **87** | **88** | **83** | **83** | **86** | **88** | **92** | **98** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 77 | 79 | 78 | 80 | 84 | 88 | 94 | 96 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 132 | 131 | 106 | 97 | 92 | 92 | 81 | 104 | 100 |
| **Vín/cider** | **131** | **129** | **124** | **120** | **116** | **113** | **114** | **112** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 115 | 115 | 114 | 112 | 110 | 108 | 108 | 106 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 653 | 587 | 446 | 383 | 317 | 291 | 292 | 288 | 100 |
| **Heitvín** | **85** | **89** | **86** | **86** | **81** | **88** | **93** | **97** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 77 | 84 | 81 | 87 | 82 | 89 | 98 | 96 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 149 | 134 | 125 | 76 | 76 | 73 | 51 | 104 | 100 |
| **Øl** | **101** | **98** | **94** | **90** | **94** | **90** | **96** | **95** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 103 | 99 | 96 | 91 | 95 | 92 | 96 | 94 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 51 | 59 | 46 | 25 | 37 | 34 | 95 | 146 | 100 |
| **Í alt** | **101** | **100** | **95** | **93** | **95** | **94** | **98** | **100** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 94 | 94 | 92 | 91 | 94 | 94 | 98 | 98 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 159 | 155 | 123 | 110 | 102 | 100 | 95 | 118 | 100 |

*Talva 4.6: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2008-2016*

Talva 4.6 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er støðugt. Bólkurin spiritus er minkaður rættuliga nógv - serstakliga innanlands. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider, er einasti bólkur, har alkohol litrarnir eru markant fleiri, enn teir vóru í 2008.

## 4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvælið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2008-2016. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| (Vøruúvæl. nøgd) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **890** | **840** | **771** | **541** | **536** | **527** | **597** | **514** | **457** |
| *- Spiritus innanlands* | 456 | 406 | 376 | 355 | 359 | 350 | 408 | 331 | 343 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 434 | 434 | 395 | 186 | 177 | 177 | 189 | 183 | 114 |
| **Vín/cider** | **1.154** | **1.086** | **1.150** | **952** | **976** | **863** | **1.036** | **883** | **824** |
| *- Vín/cider innanlands* | 908 | 890 | 938 | 842 | 858 | 753 | 921 | 779 | 746 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 246 | 196 | 212 | 110 | 118 | 110 | 115 | 104 | 78 |
| **Heitvín** | **89** | **90** | **80** | **69** | **67** | **58** | **81** | **50** | **57** |
| *- Heitvín innanlands* | 62 | 68 | 60 | 54 | 52 | 48 | 66 | 36 | 42 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 27 | 22 | 20 | 15 | 15 | 10 | 15 | 14 | 15 |
| **Øl** | **379** | **314** | **230** | **217** | **281** | **217** | **227** | **198** | **215** |
| *- Øl innanlands* | 339 | 269 | 187 | 182 | 238 | 184 | 190 | 167 | 182 |
| *- Øl tollfrítt* | 40 | 45 | 43 | 35 | 43 | 33 | 37 | 31 | 33 |
| **Alkoholfrítt** | **18** | **9** | **14** | **14** | **16** | **6** | **10** | **8** | **5** |
| *- Alkoholfrítt innanlanc* | 18 | 9 | 10 | 11 | 11 | 6 | 7 | 6 | 5 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | | | 4 | 3 | 5 | | 3 | 2 | |
| **Í alt** | **2.530** | **2.339** | **2.245** | **1.793** | **1.916** | **1.699** | **1.991** | **1.685** | **1.589** |
| *- Í alt innanlands* | 1.783 | 1.642 | 1.571 | 1.444 | 1.548 | 1.369 | 1.621 | 1.342 | 1.341 |
| *- Í alt tollfrítt* | 747 | 697 | 674 | 349 | 368 | 330 | 370 | 343 | 248 |

*Talva 4.7: Vøruúrvæl býtt í vørubólkar, 2008-2016*

Nógv størsta vøruúrvalið er vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 2.530 ymisk sløg av løgi í 2016 í mun til 1.589 sløg av løgi í 2008. Vøruúrvælið og tænastn verða áhaldandi ment í mun til tað ið rørir seg uttanlands umframt í tráð við tað viðskiftafólk eftirspyrja. Mett verður at hesin vøkstur fer at halda fram komandi árini og krevur hetta meir av starvsfólkum okkara, sum tó fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvælið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

## 4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva

Talva 4.8 niðanfyri vísur í fyrstu linju talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2008-2016.

| Fólkatalið | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðal 15 ár og eldri | 39.094 | 38.592 | 38.176 | 37.890 | 37.844 | 37.898 | 37.905 | 37.893 | 37.755 |
| Miðal tils. | 49.503 | 48.880 | 48.442 | 48.121 | 48.133 | 48.326 | 48.471 | 48.554 | 48.462 |
| **Nýtslan, alk.l. pr. íbúgva** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** | **2010** | **2009** | **2008** |
| Alk.l./15 ár + (RSL) | 4,6 | 4,7 | 4,6 | 4,7 | 4,8 | 4,8 | 5,0 | 5,0 | 5,1 |
| Alk.l./15 ár + (Samlað í FO) | 6,3 | 6,3 | 6,3 | 6,3 | 6,6 | 6,4 | 6,7 | 6,9 | 7,0 |
| Tollfrítt (Samlað í FO) | 1,3 | 1,2 | 1,0 | 0,9 | 0,8 | 0,7 | 0,6 | 0,7 | 0,6 |

*Talva 4.8: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2008-2016 og miðal sølan av alkohol litrum*

*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum RSL (*sí talvu 4.5*), verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri, sæst at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi.

Í 2008 er talið 5,1 alkohol litrar, og er síðani minkað til 4,6 alkohol litrar í 2016, sum ávíst í mittastu linju í talvu 4.8. Viðmerkjast skal tó at hetta bert umfatar tøl fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum RSL.

Næst niðasta linjan vísir tølini sum siga hvussu nógvar alkohol litrar føroyingar 15 ár og eldri í miðal keypa/drekka árliga. Hesi tøl umfata søluna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins og sølu gjøgnum føroysku bryggjaríini. Her sæst, at nýtslan í Føroyum er fallin frá 7,0 alk. ltr. til 6,3 alk.ltr. pr. íbúgva 15 ár og eldri í tíðarskeiðnum 2008-2016 .

Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu. Tey tøl, sum síggjast niðast í Talvu 4.8 vísa tollfría vøru, seld gjøgnum RSL og føroysku bryggjaríini per. íbúgva 15 ár og eldri. Tað veruliga talið er óivað nakað hægri, tí her vantar tollfrít innflutt av ferðafólki við skipi og tollfrítt innflutt við ferðafólki, ið hevur keypt rúsdrekka uttanlands.

# 5. Ársroknskapur fyri 2016

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2016 settur upp í mun til árið 2015. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | Nota | **Ár 2016** | **Ár 2015** |
|---|---|---|---|
| Inntøkur: | | | |
| Vørusøla | | 127.437.918 | 125.765.637 |
| Vørunýtsla | | -89.442.501 | -88.162.256 |
| Skiftisavlop | | 37.995.416 | 37.603.381 |
| | | | |
| Útreiðslur: | | | |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | 13.599.282 | 13.150.028 |
| Avskrivingar | 4 | 886.026 | 914.332 |
| Annar kostnaður | 2 | 6.474.225 | 6.208.636 |
| Útreiðslur íalt | | 20.959.534 | 20.272.996 |
| | | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | | 17.035.882 | 17.330.385 |
| Fíggjarpostar | 3 | 45.234 | 28.003 |
| Roknskaparligt avlop | | 17.081.116 | 17.358.388 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 17.081.116 | 17.358.388 |
| Avskrivingar | 886.026 | 914.332 |
| Íløgur | -1.234.758 | -1.416.244 |
| Nettoavlop | 16.732.384 | 16.856.476 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.848.000 | 16.848.000 |
| Munur | -115.616 | 8.476 |

## 5.2 Fíggjarstøða

| | Nota | 31.12.2016 | 31.12.2015 |
|---|---|---|---|
| **OGN:** | | | |
| Støðisogn | 4 | 1.833.248 | 1.484.516 |
| Vørugoymsla | | 14.019.551 | 13.297.579 |
| Vøru- og tænastuáognogn | | 204.929 | 207.502 |
| Onnur áogn | | - | - |
| Tíðaravmarkingar | | 1.584.307 | 1.359.175 |
| Tøkur peningur | | 2.888.953 | 3.579.079 |
| Ogn tilsamans | | 20.530.988 | 19.927.851 |
| | | | |
| **SKULD:** | | | |
| Eginogn | 5 | 1.833.248 | 1.484.516 |
| Vøru- og tænastuskuld | 6 | 6.177.328 | 2.951.129 |
| Onnur skuld | | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 7 | 10.167.177 | 14.073.663 |
| Tíðaravmarkingar | | 1.297.272 | 978.467 |
| Meirviriðisgjald | | 1.055.962 | 440.077 |
| Skuld íalt | | 18.697.740 | 18.443.335 |
| Eginogn og skuld tilsamans | | 20.530.988 | 19.927.851 |
| | | | |
| Leasingskyldur | | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | | 4.110.050 | 2.446.764 |